# Dansiskeið



***Nú kvøldini gerast longri, verður aftur farið at svinga...***
***...um nóg nógv tekna seg, skipar Dansifrøi fyri dansiskeiði í aulini í studentaskúlanum í Hoydølum.***

***Bólkarnir verða hesir:***

***Týskvøld:***

| | |
|---|---|
| ***Bólkur1:*** | 19.00 til 20.00 Argentinskur dansur |
| ***Dansileiðarar:*** | Anne Lise & Mads A. Winther |
| ***Tilmelding á tlf.:*** | 31 53 10 |
| | |
| ***Bólkur2:*** | 20.30 til 21.30 fólkad. / dansispøl<br>Blanda hold við livandi tónleiki |
| (Kristian Blak, Hilmar Joensen og aðrir gestatónleikarir) | |
| ***Dansileiðari:*** | Sharon Weiss |
| ***Tilmelding á tlf.:*** | 31 48 15 / 22 86 53 ella til<br>sharon_weiss@skulin.fo |
| | |
| ***Hóskvøld*** | |
| | Fólkadansur & Dansispøl |
| ***Bólkur3:*** | 19.00 til 20.00 Byrjarar |
| ***Bólkur4:*** | 20.00 til 21.00 Tey ið hava<br>dansa 2 ár ella meira |
| ***Bólkur5:*** | 21.00 til 22.00 Tey ið hava<br>dansað í fleiri ár |
| ***Dansileiðarar:*** | Ruth og Jógvan Martin Mørk |
| ***Tilmelding á tlf.:*** | 31 61 25 ella til<br>jm0810@skulin.fo |

***Kostnaður fyri dansiskeiðið 2006/2006 er kr. 500,00 + limagjald***

**Dansiskeiðið byrjar týskvøldið 19. september 2006 til 15. mars 2007. Áhugaði verða biðin um at tekna seg sum skjótast. Gjaldast skal við fyrsta frálærutíma.**

Eins og undafarnu ár skipar Dansifrøi fyri dansifrálæru í gomlum sum nýggjum dansum. Tað liggur nær at hugsa sær, at tað at dansa gamlar dansir er gamaldags. Men soleiðis munnu tey yvir 1500 fólkini, sum í eitt styttri ella longri tíðarskeið hava verið limir í dansifrøi, neyvan hava hugsað.

At dansa er stuttligt, at dansa er eisini ein góður máti at koma burtur frá tí daglig arbeiðsresinum...
Dansifrøði er eisini annað enn dansur! Tann sosiala samveran er eisini ein týðandi partur av felagsskapinum.

Dansifrøi

# Heilsufrøðingur

Heilsufrøðiskipanin søkir eftir avloysara til Suðuroynna fyri heilsufrøðing í barnsburðarfarloyvi.

Starvið er 28 tímar um vikuna og verður at seta skjótast tilber og fram til 1. august 2007.

Arbeiðið er samansett virksemi, við tænastu til barnafamiljur og skúlar á økinum. Starvið er primært til smábarnaøkið. Stórur dentur verður lagdur á tvørfakligt samstarv.

**Vit kunnu bjóða:**
- Sjálvstøðugt og spennandi arbeiði, og til tíðir krevjandi.
- Fakliga menning og supervisión
- At verða partur av einum samstarvstoymi við positivum og engageraðum starvsfeløgum. Væntast kunnu broytingar í mun til raðfestingar og mannagongdir í samband við menningarverkætlan.

**Førleikakrøv**
- Útbúgving sum heilsufrøðingur.
- Tað er ein fyrimunur, at tú hevur royndir frá heilsufremjandi arbeiði á barna/familjuøkinum.
- Áhugi fyri fakligari menning. Arbeiðið er skipað í samstarvstoymir og er tað tí ein fyrityreyt, at viðkomandi hevur góð samstarvsevnir og kann viðvirka til at menna kollegiala samstarvið.

**Lønar- og setanartreytir:**
Løn sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn:**
Umsókn skal sendast til:

**Heilsufrøðiskipanin**
Niels Finsensgøta 28, 2. hædd,
Postboks 132
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 27. september 2006.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Heilsufrøðiskipanina, á tlf. 354010.

*Arbeiðið hjá heilsufrøðingum er m.a. at eygleiða og kanna barnið, at ráðgeva/vegleiða foreldrum viðvíkjandi barnsins sálarligu, sosialu og likamligu menning, foreldraleikluti og tilknýti. Á skúlunum er arbeiðið, umframt hetta, at gera regluligar funktiónskanningar, samtala við børn, hetta bæði persónligar, bólkasamrøður og undirvísing.*

# Starv sum leiðari fyri Fuglafjarðar sløkkiliði

Starvið sum leiðari fyri Fuglafjarðar sløkkilið, sum er ein deild av Fugalfjarðar kommunu, verður hervið lýst leyst til setan tann **1. desember 2006** ella skjótast eftir hetta.

**Krøv:**
- Viðkomandi skal hava handverksliga ella byggifrøðisliga útbúgving
- Skal hava tikið ella skal taka neyðug skeið sambært kunngerð um útbúgving av sløkkiliðsmanningum og brunaumsjónarmonnum
- Skal vera við til at menna kommunala brunaverkið og brunamenninar, so sløkkilið altíð er á einum tekniskt forsvarligum støði
- Heilsuváttan verður kravd
- Skal hava stóra koyrikortið
- Skal hava góð samstarvsevni

**Lønar- og setanarveiðurskifti:**
- Starvið, sum verður normerað til 15 tímar um vikuna, verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið
- Fyrstu 3 mánaðarnir verða at rokna sum royndartíð.

**Nærri upplýsingar**
um starvið kunnu fáast við at venda sær til Gordon M. Petersen, sløkkiliðsleiðara á tlf. 220101 ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á tlf. 444006.

**Umsóknarfreist:**
Skrivligar umsóknir saman við próvskjølum skulu vera

**Fuglafjarðar býráð**
Norður í Gerði 10B
530 Fuglafjørður

í hendi í seinasta lagi **hósdagin tann 21. september 2006 kl. 16.00.**

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Nærri upplýsningar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Gordon M. Petersen, brunaumsjónarmann á tlf. 220+101 ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á tlf. 444006.

Fuglafjørður, tann 6. september 2006

**Fuglafjarðar býráð**

# Læknaskrivari

1 starv sum læknaskrivari 3/4 tíð er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

**Førleikakrøv:**
- Útbúgving sum læknaskrivari ella annar líknandi førleiki
- Teldukunnleiki á basalum støði
- Fyrikomandi

**Løn:**
Sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Freistin at søkja er úti 24. september 2006. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til viðtaluna á tlf. 313700. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum kunnu sendast til:

**Kommunulækni Kári Jacobsen**
**J. Paturssonargøta 22**
**FO-100 Tórshavn**

zarepta

# Frá Zarepta

Heystlega fyri ung í aldrinum 14 til 17 ár verður í Zarepta frá fríggjadegi 6. okt. til mikudag 11. okt. 2006.

Tekning á tlf. 28 21 40 millum kl. 15.00 og 19.00.

Starvsfólkatekning á tlf. 28 40 40.

# Til leigu í Vági

Handilshøli – umleið 7 x 14 m
– mitt í Vági til leigu

**Ring 37 33 46 eftir kl. 13**

*Sjó-El*